# Jólamenninir eru komnir

**Miðbýurin í Havn er merktur av, at tað stundar til jóla. Fólk eru komin í jólahýr og jólamenn vitja, eins og sangur og hornblástur merkir dagarnar, nú jólini veruliga nærkast. Og hesar dagarnar svevur jólamaðurin í býnum, nevniliga í Jólahúsinum í Grasagarði**



Seinnapartin í gjár komu jólamenninir siglandi inn eftir vánni



JÓL Í MIÐBÝNUM
*Dagfinn Olsen*

Kunningarstovan skipar fyri ymsum tiltøkum í Miðbýnum, nú jólini eru í hondum. Longu í gjár vitjaðu jólamenn, eins og hornblástur var at hoyra.

Jólamaðurin vitjar í gøtunum í Miðbýnum og eisini jólahúsið stendur í býnum, nevniliga í Grasagarði. Og har heldur jólamaðurin til og longu í nátt hevur hann sovið har, um alt gekk honum eftir vild. Hetta ætlar jólamaðurin eisini at gera næstu dagarnar.

Í dag koma jólamenninir í býin klokkan 17. Fríggjadagin koma teir klokkan 16, leygardag klokkan 15 og sunnudagin klokkan 16. Teir fara at spáka í gøtunum í Miðbýnum og heilsa uppá stór og smá. Og óivað verður hugnaligt at fáa eitt prát og kanska okkurt gott frá jólamonnunum.

Hugnaligt er í Miðbýnum hesa tíðina og minst 3 tónleikatiltøk eru hvønn dagin í gøtunum í Havn. Verður hugt í skránna fram til jóla, so sæst, at Ung úr Evangeliihúsinum syngja, GHM spælir, Havnar Hornorkestur spælir, Frelsunarherurin spælir, Jassarnir spæla og Tórshavnar Ungdómshornorkestur spælir. Eisini syngur Cantabile, eins og børn og ung úr Ebenezer.

### Á rossabaki

Fríggjadagin 21. desember koma jólamenn á rossabaki á Kongabrúnna í Havn klokkan 16. Teir fara at vitja í smáu gøtunum har á leið, men teir far eisini víðari og fara at vitja sera víða um í býnum.

### Fjølment

Dagarnir undan jólum eru í Miðbýnum merktir av vitjan av jólamonnum og eini góðari blanding av hornblástri og sangi.

Nógv fólk vitja Miðbýin og longu nú sæst fjøld av fólki vitja gøturnar, eisini útisetar, ið vitja heima, sigur Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni.

Fólk vitja Miðbýin fyri at síggja og hoyra og uppliva huglagið, stemmningin, og fyri at hitta jólamenn og onnur góð fólk, ið ein kanska ikki sær so ofta.

Eisini hugnaligu ljósini, sum Býráðið hevur sett upp, seta dám á og geva Havnini serstakan jóladám.

# Jólahúsið fekk ikki jólafrið

**Jólahúsið stendur aftur í Grasagarði í Havn. Í fjør stóð tað niðri í býnum við gongugøtuna, men har høvdu fólk hug at gera seg inn á húsið og serliga ringt var um vikuskiftini. Men í ár vóna fólk í Miðbýnum, at nissurnar og vætrarnar fáa jólafrið og at jólamaðurin fær náttarfrið**



JÓL Í MIÐBÝNUM
*Dagfinn Olsen*

Kenda og sera fitta jólahúsið í Miðbýnum í Havn stendur aftur í Grasagarði. Í fjør var roynd gjørd at seta húsið longur oman í býin, men við vánaligum úrsliti.

Serliga var tað vikuskiftiskvøldini, at ótangar høvdu hug at ganga húsinum ov nær. At enda var so galið, at húsið var nærum sorlað sundur og jólafriðurin var brotin.

Hesum gjørdust fólk í Miðbýnum sera kedd av og tí hava tey tí flutt jólahúsini niðan aftur í Grasagarð, eins og árini undan.

Hóast mett var, at besta fyribyrging var at gera í stand aftur beinanveg og halda húsini í góðum standi, so gjørdist alsamt álvarsligari harðskapur vart við seg, so ógjørligt var at halda fram á hesum stað.

### Jól í Grasagarði

Mett verður tó eisini, at húsini standa væl í Grasagarði. Fólk síggja ljósini í vindeyganum og vita, at hetta ber boð um, at jólini eru í hondum.

Í húsinum eru nissur og vætrar, greytur, gávur og mangt annað. Ætlanin hjá jólamanninum er at sova í húsinum, um hann fær stundir og um veðrið loyvir hesum.

Jólahúsið fær rættiliga góðan frið í Grasagarði, tó at onkur óboðin gestur er komin á gátt. Men fólk í Miðbýnum vóna, at tað slepst undan slíkum, so nissur og vætrar fáa frið og so jólamaðurin sleppur at liggja nátt í friði.



## Jólaaftan 24. desember

### SvF

13.30 Glóa 12:13 (e)
14.00 Meðan vit bíða
Søgan um jólamannin - barnafilmur
Glóa 13:13
Jólakonsert við Tórshavnar Musikkskúla
Markleysa ríkið 2:26 - italsk teknirøð
16.50 Jólaevangeliið fyri deyv
17.00 Steðgur
20.45 Kona prest - amerikanskt jóladrama
22.45 Midnáttarmessa úr Pæturskirkjuni í Rom
0.45 Liðugt

### Eurosport

7.30 Xtreme Sports - Yoz Mag
8.00 Adventure - Adnatura
9.00 Olympic Games - Olympic Magazine
10.00 All Sports - Watts
10.30 Olympic Games - Olympic Magazine
11.00 Tennis - US Open
13.00 Tennis - Who's that Girl?
13.30 Football - Champions League Classics
14.30 Ski Jumping - World Cup
16.00 Dancing - Dancing in Paris-Bercy
17.00 Football - Champions League Classics
18.00 Football - World Cup Legends
19.00 Figure Skating - World Championships
20.30 Tennis - Who's that Girl?
21.00 Football - 1998 Fifa World Cup
23.00 Football - World Cup Legends
0.00 All Sports - Watts
0.30 Close

### BBC Prime

0.20 Bread – Christmas Special
1.30 Comedy Nation
2.00 Reputations: »Muhammad Ali – More than just a Boxer?«
3.00 TLZ: »Science at War – Echoes of War«
4.00 TLZ: »Back to the Floor – Working Holiday«
4.40 TLZ: »Megamaths – Fractions – Fifths and Tenths«
5.00 TLZ: »TLZ: »Suenos World Spanish«
5.15 TLZ: »TLZ: »Suenos World Spanish«
5.30 Look Ahead
5.45 Look Ahead
6.00 Space Detectives: »Future«
6.15 Playdays: »Tent Stop«
6.35 Blue Peter
7.00 Ready Steady Cook
7.30 Victorian Flower Garden
8.00 House Invaders: »Leighton Buzzard«
8.30 Bargain Hunt
9.00 On the Path of the Reindeer
10.00 Noddy In Toyland – Xmas Special
11.00 Changing Rooms – Christmas Special
11.30 A Christmas Dickens: »The Boy at Mugby«
12.00 Best of British: »Cliff Richard«
12.40 Lovejoy: »The Prague Sun«
14.15 Space Detectives: »Future«
14.30 Playdays: »Patch Stop«
14.50 Blue Peter
15.15 Top of the Pops
15.45 Molly's Zoo at Christmas
16.15 Animal Hospital
16.45 Victoria and the Jubilee
17.35 A Christmas Dickens: »The Boy at Mugby«
18.15 The Weakest Link
19.00 Eastenders
19.30 Dad: Christmas With Dad
20.00 Shooting Stars - Christmas Special
20.40 Shooting Stars - Christmas Special
21.15 Shooting Stars - Christmas Special
21.45 Parkinson
22.45 Carols From Kings
23.30 Christmas Midnight Mass

### BBC World

0.00 BBC News followed by Weathe
0.30 World Review – Beyond 2001: »New York Story« 1:8 (r)
1.00 BBC News followed by Weather
1.30 This Week (r)
2.00 BBC News followed by Weather
2.30 Dateline London (r)
3.00 BBC News followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 Business Diary (r)
4.00 BBC News followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News followed by Weather
8.30 HARDtalk (r)
9.00 BBC News followed by Weather
9.30 Correspondent
10.00 BBC News followed by Weather
10.30 World Review – Beyond 2001: »New York Story« 1:8 (r)
11.00 BBC News followed by Weather
11.30 HARDtalk (r)
12.00 BBC News followed by Weather
12.30 The Global Equation
12.45 Sport Today
13.00 BBC News followed by Weather
13.30 Correspondent (r)
14.00 BBC News followed by Weather
14.30 World Review – Beyond 2001: »New York Story« 1:8 (r)
15.00 BBC News followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News followed by Weather
17.15 The Global Equation (r)
17.30 Correspondent (r)
18.00 BBC News followed by Weather
18.30 The Global Equation (r)
18.45 Sport Today
19.00 BBC News followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News followed by Weather
20.30 Correspondent (r)
21.00 BBC News followed by Weather
21.30 The Global Equation
22.00 BBC News followed by Weather
22.30 World Review – Beyond 2001: »Afghan Aftershock« 3:8
23.00 BBC News followed by Weather
23.30 The Global Equation (r)
23.45 Asia Today

### TV3

5.20 Børne-hjørnet med Disney
7.20 Julebio: Svaneprinsessen
8.30 Ricki Lake (G)
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen (G)
11.00 Horton-sagaen
11.50 Panter-tanter
12.20 Vild med dig
12.50 Pæn pige – sej sild
13.20 Julebio: Et juleeventyr
15.10 Sjov og Spas
15.40 Baywatch Hawaii
16.35 Ricki Lake
17.30 Med på moden
18.00 Sabrina - skolens heks
18.30 Alle tiders barnepige
19.00 Mandagsbio: Et juleminde
20.55 På sporet af den lyserøde panter
22.45 Arabescue
0.45 Simpsons
1.15 Nash Bridges
2.15 Guys like us
2.45 Drøm videre
3.15 Dilbert
3.40 Sunset Beach
4.25 Godnat

### ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Ole Jacob Jacobsen í Fuglafirði lesur
7.15 Jólaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sunnudagsløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis.
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Ole Jacob Jacobsen í Fuglafirði lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Telefonprát við børnini - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis.
11.30 Jólaløg - Rúni Jákupsson velur tónleikin.
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.35 Jólafjarrit frá skipum
13.00 Hugleiðingar um jól - Heri Joensen prestur leggur til rættis.
13.30 Eitt ljós verður tendrað - Siðir og sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Jólatræið sum jólasiður - Armgarð Arge leggur til rættis.
14.30 Jólatónleikur - Øssur Egholm skipar fyri.
15.00 Jólatræ í útvarpinum - Beinleiðis sending úr leikhøllini. Jógvan Arge leggur til rættis
16.00 Gentur úr Leirvík syngja jólatónar - Nýggjar upptøkur við gentum úr Leirvík. - Jóannes S. Hansen leggur til rættis.
17.00 So gylt mundi glæman vera - Jólaaftan í Vágs kirkju. Upplestur, sangur og tónleikur. M. a. verður framborin jólaliturgi eftir danska tónaskaldið J. P. E. Hartmann
18.00 Jólaevangeliið - Jónvein Bech, prestur, lesur
18.05 Jól hava einglaljóð - Advents- og jólasálmar Johs. Andr. Næs leggur til rættis
22.00 Jól og jólahald - Sending við jólapráti og jólatónleiki. Øssur Egholm er vertur.
23.59 Midnáttarmessa í katólsku kirkjuni - Beinleiðis sending úr Mariukirkju?

## Eitt ljós verður tendrað

**ÚF Jólaaftan kl. 13.30**

Í sendingini hoyra vit tveir føroyskar jólasangir og annars jólasangir úr fimm ymiskum londum. Eisini verður hugleitt um jólafyrireikingar í Føroyum fyri umleið 100 árum síðani.

## Jólatræið sum jólasiður

**ÚF Jólaaftan kl. 14.00**

Søgan hjá jólatrænum er long og hugvekjandi. Træið er ikki bert til prýðis. Tað kann evnast til mangar ymiskar lutir og kann eisini nýtast í heilsurøktini. Fyrr vórðu súrepli og smáar gávur hongd á træið. Tá kundu børnini rysta tað, so alt datt niður, og tey hentaðu tað uppaftur. Jólatræið hevur eisini symbolskt virði. Tað var eitt træ við súreplum, sum elvdi til fallið hjá menniskjanum, men nú vísir jólatræið á jólum okkum, at Frelsarin kom við náði og gleði. Nøkur ár seinni fullførdi Frelsarin sín gerning á krossartrænum.

Armgarð Arge leggur til rættis.

## So gylt mundi glæman vera

### Jólaliturgi á føroyskum

Í hesi sendingini verður jólaliturgiin hjá danska tónaskaldinum J. P. E. Hartmann fyri fyrstu ferð at hoyra í føroyskum málbúna. Hartmann komponeraði hesa liturgi miðskeiðis í 19. øld til Vor Frue Menighed í Keypmannahavn.




*J. P. E. Hartmann á gamalsaldri við orglið í Dómkirkjuni í Keypmahnnahavn*

Hann var organistur í hesi kirkju í meir enn hálva øld, og har hevur liturgiin verið sungin hvønn jólaaftan síðani.

Nú hevur Alexandur Kristiansen í Fuglafirði týtt jólaliturgiina hjá Hartmann til føroyskt. Liturgur er Jónsvein Bech, prestur, Kirkjukórið Ljómur syngur við Hans Paula Tórgarð sum leiðara, og deknarnir í Vágs kirkju Páll Jacobsen og Martin Andreasen lesa.

## Meðan vit bíða

Jólaaftan eru tveir teknifilmar á skránni, vit byrja við teknifilminum um tann fyrsta jólamannin. Og síðani fara vit at hyggja at tí síðsta partinum um vætturin »Glóa«. Hvussu man fara at gangast Glóu Jólaaftan, man tað fara at eydnast henni at finna ein annan vættur. Og sjálvandi fara børnini at dansa og sygnja um træið. Vit fara eisini at senda eina jólakonsert hjá Tórshavnar Musikkskúla, har børnini spæla jólaløg. Og vit enda við 2. parti av teknirøðini um Jesus. Fyrsti partur verður sendur 23. des. kl. 19.00. Røðin er í 26 pørtum, sum verða sendir hvørt sunnukvøld.

Verður endursent ímorgin kl. 11.30.




### Rás 2

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Tónleikur
11.00 Fólk á rásini (e) - Vagnur Michelsen prátar við Elina Mortensen av Tvøroyri (seinni partur)
12.00 Tónleikur
13.00 Jólini (e) - Sending um jól og jólahald - Óla Jákup Rólantsson leggur til rættis
14.00 Tónleikur
17.00 Countrysending, The Outlaw´s (3-4) (e) - Hesaferð við Johnny Cash - Laila Jacobsen leggur til rættis
18.00 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) (e) - Endursending frá hósdegnum - Endatíðin: »Fyrigeving millum menniskju« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
0.00 Liðugt

### Lindin

9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.15 Okkara dagliga breyð
10.00 Søga úr »Jólastjørnuni« frá 1940–50 - Hjørdis Petersen lesur
11.00 Jólahugni í Lindin v/ M. C. Restorff
12.30 »Himmalin« eftir D. L. Moody
13.00 Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
14.30 »Jesus og eg« barnasending v/ Stellu Zachariassen (e)
15.00 Bønarlinjan frá hósdegnum verður endursend
17:15 »Jólafjas« barnasending vertur Brynhild Poulsen
18.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.05 Føroyskur jólatónleikur
19.00 »Jesus og eg« barnasending v/ Stellu Zachariassen (e)
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
21.00 Jólaboðskapur, Møti v/ Símun Absalonsen
22.00 Søga úr »Jólastjørnuni« frá 1940–50 - (e)
23.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
22.55 Dagsskráin fyri Jóladag verður lisin
23.10 Blandaður jólatónleikur, Dagsins orð, okkara dagliga breyð o.a
4.00 Vit gevast